Búskapur og vinna:

## Vildu keypa rotnan fisk

Sum vit hava umrøtt fyrr í hesum teigi, er tað fleiri ferðir hent í seinastuni, at keyparar í ES hava sent norskan fisk aftur til Noregs, tí keypararnir hava ikki verið nøgdir við góðskuna. Stutt sagt hava keypararnir sagt, at fiskurin var rotin.

Men tað er kanska ikki allur sanleikin.

Blaðið Aftenposten skrivaði í gjár um ein fiskaútflytara í Norðurnoregi, sum hevði sent 18 tons av toski til Danmarkar. Tá tann danski keyparin fekk fiskin, boðaði hann útflytaranum frá, at fiskurin var ikki nóg góður, og at hann tí ikki vildi rinda tann avtalaða prísin fyri hann. Hinvegin var keyparin sinnaður at keypa fiskin fyri ein minni prís.

Tað vildi útflytarin Finnmarksfisk ikki góðtaka og bað um at fáa fiksin aftur. Tá fiskurin so kom aftur til Norðurnoregs, lat Finnmarksfisk ein vrakara kanna fiskin í bingjunum. Niðurstøðan hjá honum var, at fiskurin var ikki fyrsta floks, men at hann væl kundi seljast sum matvøra.

Rune Holmen í Finnmarksfisk sigur við Aftenposten, at teir nú hava gjørt av at salta fiskin og at senda hann til Portugals. Sjálvt um portugisar hava rættiliga strong góðskukrøv, ivast hann ikki í, at teir fara at rinda vanligan prís fyri hendan fiskin.

Rune Holmen sigur, at teir hava ofta trupulleikar við keyparunum á ES-marknaðinum hesa tíðina á árinum, tí keypararnir vita, at nógvur fiskur er á norska marknaðinum. Tí nýta keypararnir høvi at royna at trýsta norsku útflytararnar til at seta prísin niður, og tað verður m. a. gjørt við at siga, at fiskurin er rotin ella vánaligur, sigur stjórin í Finnmarksfisk.

Í Fiskivinnustýrinum vátta tey, at tey eru vitandi um, at ES-keypararar leggja trýst á norsku útflytararnar, tá nógvur fiskur er á norska marknaðinum.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Bin Laden er í Pakistan



*Osama bin Laden. Nú ljóðar, at hann hevur verið í Peshawar í Pakistan síðani í desember.*

**Yvirgangsleiðarin Osama bin Laden er í pakistanska býnum Peshawar.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Amerikanska blaðið Washington Post skrivaði í gjár frá álítandi keldum í Pakistan, at tann eftirlýsti yvirgangsmaðurin Osama bin Laden fjalir seg millum sínar viðhaldsmenn í pakistanska býnum Peshawar.

Sambært keldunum flýddi bin Laden úr fjallaholunum í Tora Bora í Afghanistan í desember, og síðani skal hann hava verið í Pakistan.

Keldurnar vita eisini at siga, at partar av pakistansku fregnartænastuni hava játtað at fjala bin Laden, og at fólk, sum eru ímóti stýrinum hjá Pervez Musharaf, forseta stuðla teimum.

Washington Post sigur seg eisini hava fingið at vita frá sínum pakistansku keldum, at hermenn hjá Taliban og al-Qaeda, sum eru í Pakistan, hava fingið boð um at fara aftur til Afghanistan at beina fyri amerikanskum og øðrum útlendskum hermonnum, sum eru har.

Síðani amerikanska stjórnin lovaði 25 milliónir dollarar í finningarløn fyri bin Laden, hevur fleiri ferðir ljóðað, at hann er í Pakistan.

# Schrøder fer at stríðast mann móti manni

**Eftir tann eyðmíkjandi ósigurin í Sachsen-Anhalt um vikuskiftið ætlar Gerhard Schrøder at gera týska ríkisdagsvalið í heyst til eitt persónligt val millum seg og konservativa kanslaravalevnið Edmund Stoiber.**

TÝSKLAND
*Árni Joensen*

–Vit fara at leggja á annan bógv. Fólka skulu velja, um tey framvegis vilja hava Gerhard Schrøder til samveldiskanslara, ella tey vilja hava Edmund Stoiber, segði Gerhard Schrøder við tíðindafólk í gjár, áðrenn hann fór á ein kreppufund í sosialdemokratisku floksleiðsluni.

Schrøder, sum ofta verður róptur "fjølmiðlakanslarin", var ikki so hugaður at tosa við tíðindafólk eftir fundin. Tvørturímóti sýtti hann fyri at gera nakra viðmerking til ósigurin í Sachsen-Anhalt, sum er størsti ósigur hjá flokkinum seinastu 50 árini.

Mánadagin segði kanslarin, at eitt ella annað hevði svikið í valstríðnum í tí eysturtýska landslutinum, og tað er einki at ivast í, at hann royndi at geva SPD-leiðaranum í Sachsen-Anhalt, Reinhard Høppner, skyldina av tí vánaliga úrslitinum. Men eygleiðarar siga, at kanslarin kann ikki smoyggja sær undan ábyrgd, tí hann var tann politikarin, sum fremstur av øllum royndi at leggja dent á síni egnu evni í valstríðnum í landslutinum.

Tá sosialdemokratarnir vunnu ríkisdagsvalið í 1998, segði Gerhard Schrøder, at hansara persónliga valstríð hevði havt avgerandi ávirkan á úrslitið. Men eygleiðarar siga, at ósigurin í Sachsen-Anhalt var ein ávaring til kanslaran um, at í veruleikanum var tað Helmuth Kohl, sum tapti valið fyri fýra árum síðani.

Gerhard Schrøder kann framvegis ugga seg við, at hann hevur munandi størri undirtøku í Týsklandi enn Edmund Stoiber. Tað er tí ikki so løgið, at hann nú roynir at snara valstríðnum frá flokspolitiskum sjónarmiðum til ein spurning um seg ella avbjóðaran.

Úr Norðurlondum:

## Nei til ásatrúgv

Eftir at hava umhugsað málið í trý ár hevur danska kirkjumálaráðið óvæntað boðað frá, at tað viðurkennir ikki ta gomlu ásatrúnna sum ein almennan átrúnað.

Í Íslandi og í Noregi er ásatrúgvin alment viðurkend sum átrúnaður. Danski felagsskapurin hjá teimum, sum halda seg til ásatrúnna, søkti fyri trimum árum síðani myndugleikarnar um at fáa trúnna viðurkenda, men nú hevur ein fýra manna nevnd í kirkjumálaráðnum samtykt at havna umsóknini.

170 fólk eru í ásatrúarfelagsskapinum í Danmark.

## Avdúkað pedofilt kervi

Danska løgreglan hevur avdúkað eitt altjóða pedofilt kervi, sum fekst við at senda barnapornografiskar myndir sínamillum ígjøgnum internetið. Higartil eru 25 fólk handtikin í ellivu ymsum londum.

At tað júst er danska løgreglan, sum hevur avdúkað kervið, kemst av, at tað hevði sín uppruna í lítla vesturjútska býnum Tarm. Har kom løgreglan eftir, at eitt par hevði misnýtt eina ellivu ára gamla gentu til pornografiskar myndir og videoupptøkur. Maðurin varð tikin longu í november í fjør, men løgreglan hevur hildið málið loyniligt fyri ikki at órógva rannsóknararbeiðið.

Donsku løgreglumenninir, sum hava arbeitt við málinum, siga, at talan er um sera óhugnaligar myndir. Løgregluovastin í Ringkøbing, sum hevur staðið fyri kanningunum, sigur at hetta er tað ringasta, sum hann hevur havt við at gera tey 30 árini, hann hevur starvast í løgregluni.

Sambært løgregluni hava fólkini í kervinum sent myndir av 35 børnum sínamillum. Alt bendir á, at tann ellivu ára gamla gentan er tað einasta danska barnið, sum hevur verið misnýtt á hendan hátt.



